LM-099/2023

Fylgiskjal 94

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Att Høgni Hoydal
Tórshavn

Tórshavn, tann 23. februar 2024

Viðmerking til Hoyringsfundin um ferðavinnulógina.

Eg var á fundinum í Aulini á Finsen tann 14.02.24. Gjødist skelkað av hugburðinum og útsagnum hjá fólki, serliga einum bónda, ið umboðaði bóndir og óðalsfólk. Tað rann mær kalt eftir rygginum. Fekk eina kenslu av einum yvirstætti, harrafólki, ið hevur tikið ræði á rættindum, sum vit vanligu íbúgvar í Føroyum halda okkum hava.

Eg havi haga- og fjalla DNA í mínum blóði. Alneyðugt fyri mína fysisku-, mentalu- og sálarligu heilsu og trivna sum heild, at eg sleppi út í haga og fjøllini. Hetta kundi eg áður, men hesi seinnu árini er tað vorið trupult. Man fer út í hagan við stúran og ampa. Veit, at nógv onnur hava tað upp á sama máta. Eg eri eisini blivin útskelda, við boðum um, at har skuldi eg ikki vága mær at koma aftur. Tá var eg einsamøll farin ein vanligan hagatúr, har eg ansaði væl eftir bæði lendi, seyði og fuglum. Onki arbeiði ella annað var í haganum tann dagin. Eg taki altíð atlit til vøkstur og gangi í boga um seyðafylgir á leiðini. Ofta havi eg beriposa við, til uppsamlan av plastikki, tómum patrónhylstrum, ull og øðrum óruddi. Men rotnar hegnspelar, niðurtikið rusta hegn og pettir av takplátum geri eg onki við.

Veit ikki hvussu eg skal gríba hetta ann. Men haldi at ferðavinna er eitt, meðan gongd í haga og fjøllum hjá føroyingum er nakað annað – og skal haldast sundurskilt.

Ger eina ferðavinnulóg fyri ferðafólk, ið ikki búgva í Føroyum. Eg meti massaturismu sum eina hóttan fyri okkum og landið alt, ella í øllum føri eina stóra avbjóðing. Helst er tað ein fyrimunur at nýta ferðaleiðarar, har eg haldi, at ferðaleiðarir úr Havnini kunnu vera eins væl kvalificeraðir sum lokalir ferðaleiðarar.

Og ger eina lóg fyri føroyingar, ið búgva í Føroyum, har vit fáa ein lógarásettan rætt at ganga frítt í øllum Føroyum, undir egnari ábyrgd. Onki við yvirformyndarí, har bóndir ella onnur staðbundin fólk avgera nær og hvar man kann ganga/ikki ganga. Man kann hava eitt yvirordna stað, har bóndir, festarir, t.d. kunnu boða frá, tá tey skulu á fjall. Har kunnu vit gongufólk altíð halda okkum ajour, so vit ikki órógva tann dagin. Tað skal ikki vera gjørligt at steingja økir vegna arbeiði ella veiðu í fleiri samanhangandi dagar. Talan kann kanska í fáum føri vera neyðugt at avmarka gongd, men tað skal vera heilt ekstremt, akkurát sum tá sjóøki verða stongd vegna skjótivenjing. Og tá bara gerast av fagligt skikkaðum fólki og landsins mynduleikum og sambart Náttúruverndarlógini. Altso ikki fyri at pakka gongufólk í vatt – vit ganga í haganum við egnari ábyrgd! Og sjálvandi fara vit væl um okkara land, tað eru neyvan vit føroysku gongufólk, ið gera tey størstu sárini í okkara náttúru, sum jú er ein partur av okkara sál.

Við ynski um, at ommanfyri viðmerkingar verða væl móttiknir, so vit føroysku gongufólk frameftir hava lógarfesta fræsla gongd í høgum í Føroyum.

Vinalig heilsan: Maria Vang, Mikkjalstrøð 15, 100 Tórshavn